


www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 08 - 2012

# Statoil fer úr Sjtokman

Statoil hevur gjørt av at selja síni 24 prosent av felagnum Sjtokman Development AG. Tað skrivar russiska blaðið Gazeta. Blaðið veit eisini at siga, at tað russiska felagið Gazprom yvirtekur tann norska partin, men vælvitandi keldur siga, at Shell skal yvirtaka partin hjá Statoil. Frammanundan átti Gazprom 51 prosent av Sjtokman Development. Franska felagið Total átti 25 prosent og Statoil 24 prosent. Tað er ógreitt, hvussu verður við partinum hjá Total. Eftir drúgvar samráðingar millum russisku myndugleikarnar og altjóða oljufeløgini samdust partarnir í 2007 um, hvørji feløg skuldu vera við í Sjtokman-verkætlanini, og at Statoil skuldi virka sum operatørur. Hildið verður, at feløgini í verkætlanini hava brúkt umleið hálva aðru milliard dollarar til at menna felagið Sjtokman Development, hóast sjálv gassverkætlanin ikki er komið serliga langt. Kunningarstjórin hjá Statoil, Jannik Lindbæk jr., sigur við norskar fjølmiðlar, at í roynd og veru er einki nýtt at siga um lutin hjá Statoil í Sjtokman-verkætlanini. -Vit høvdu ein sáttmála, sum fór úr gildi tann 30. juni, og hann er ikki endurnýggjaður. Annars er einki nýtt í hesum. Vit samskifta við Gazprom við tí fyri eyga at luttaka í einari lønandi verkætlan, sigur hann.